VÁGA KOMMUNA

# Gerðabók

# Býráðið

| | |
|---|---|
| **Dagfesting:** | 24.02.2020 kl. 18:00 |
| **Fundarstaður:** | Miðvágs skúli |
| **Málnr.:** | 20/00006 |
| Til staðar: | Eyðdis Hartmann Niclasen, Rósa Samuelsen, Dagbjørn Hansen, Albert Ellefsen, Jens Gaardlykke, Heðin Poulsen, Dánjal Thomsen, Jonhard Joensen, Jórun S. Haraldsen, Dánial Johansen, Jóhannis Joensen |
| Varalimir: | |
| Ikki til staðar: | |
| Aðrir partar: | |
| Fundarskrivari: | Jóannes N. Dalsgaard |


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | | |
| 8/20 | 19/00250-5 | Støðutakan til mótmæli og broytingaruppskot til býarplan og byggisamtykt fyri Vága kommunu 2017-2026, sum ikki eru avgreidd | 3 |
| 9/20 | 19/00366-10 | Støðutakan til uppskot frá Lydiu Laksáfoss um, hvat skal gerast við Kálvalíð-savnið | 8 |
| 10/20 | 19/00672-8 | Umsókn um byggiloyvi til umbygging v. m á matr. nr. 49 í Sandavági | 9 |
| 11/20 | 19/00723-10 | Støðutakan til tilboð frá Gilla Hansen um at keypa matr. nr. 133k í Sandavági | 10 |
| 12/20 | 19/00837-4 | Støðutakan til fyrispurning frá Petur Elias Petersen um at gera makaskifti millum matr. nr. 237c og 236b í Sandavági | 13 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 13/20 | 19/00878-5 | Støðutakan til ynski hjá Hans Paula Johannesen um at geva neyst á matr. nr. 173b í Miðvági og bát til Miðvágs Bygdasavn | 16 |
| 14/20 | 20/00036-5 | Net søkir um at fáa økið á Matr. nr. 12c til at seta tøknihús og mastur á. | 17 |
| 15/20 | 20/00098-3 | Ummæli av umsókn um sundurbýti av matr. nr. 97a í Sandavági | 18 |
| 16/20 | 20/00100-2 | Støðutakan til umsókn frá Miðvágs Róðrarfelag um fíggjarligan stuðul til at gera bátabrúgv | 19 |
| 17/20 | 20/00104-2 | Støðutakan til uppskot frá borgarstjóranum um at lata Sandavágs Ítróttarfelag (SÍF) Loftagrund (matr. nr. 150d í Sandavági) til ognar | 20 |
| 18/20 | 19/00308-7 | Støðutakan til, um arbeiði at gera útstykking eystanfyri Skaldaveg skal bjóðast út | 21 |
| | | | |

*Formansváttan:*_____________

**Til støðutakan**

## 8/20 Støðutakan til mótmæli og broytingaruppskot til býarplan og byggisamtykt fyri Vága kommunu 2017-2026, sum ikki eru avgreidd

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.02.2020 | 12/20 |
| 2 Býráðið | 24.02.2020 | 8/20 |

**Málslýsing:**

Tá Almenna byggisamtyktin fyri Vága kommunu 2017-2026 var gjørd, komu 29 mótmæli og viðmerkingar til ætlan býráðsins.
Býráðið avgjørdi at ganga summum mótmælum á møti, meðan onnur ikki vóru gingin á møti. Fleiri fingu boð um, at mótmæli ella viðmerking teirra verður viðgjørt í eini komandi endurskoðan av býarplaninum.

Hesi eru:

1. Elspa Egilstoft mótmælir at alment frítíðarøki (øki F) gongur gjøgnum fleiri havar á matr. nr. 235a, 234, 83b, 116g, 160b og 74g í Sandavági.

2. Elspa Suffía Joensen mótmælir at ætlanini er at friða gøtuna niðan í Kálvalíð, uttan at avtala er gjørd við festara.

3. Elspa Suffía Joensen mótmælir ymiskum ásetingum í Vatnsoyrum. Harímillum at kaminan frá krígsárunum liggur sum alment frítíðarøki (øki F) og ymisk øki, sum eru útløgd til frílendi (øki H).

4. Dánjal Poulsen og fleiri heita á kommununa um at víðka sethúsaøki (øki B) í Vatnsoyrum oman móti Torvgøtu. Broytingin fevnir um matr. nr. 397a, 398d, 398e, 400a, 399g og 402g.

5. Katrin Vang mælir til at broyta ásetingar fyri matr. nr. 402e í Vatnsoyrum til sethúsaøki (øki B).

6. Majbritt Poulsen mælir til, at almenna frítíðarøki í Vatnsoyrum verður longt yvir á áarbakkan norðanfyri ánna.

7. Karl Johan Nielsen søkir um, at matr. nr. 402d í Vatnsoyrum verður broytt frá at vera øki A (miðstaðarendamál) til øki B (sethúsaøki)

8. Malan Gudmundsen mótmælir at matr. nr. 183b í Sandavági er tikið úr sethúsaøki og lagt í øki E (almennir stovnar).

*Formansváttan:____________*

9. Hagaparturin Eggin mótmælir, at matr. nr. 17 í Miðvági verður lagt sum fornminni (øki M). Víst verður á, at hagin, sum er eigari, er ikki hoyrdur hesum viðv. og hevur ikki fingið samsýning.

10. Arnold Thomassen hevur gjørt vart við, at sethúsini á Sóljuteigi 16 í Sandavági, matr. nr. 87w eru bygd útum B-økið (sethúsaøki) og koma inn á H-øki (frílendi).

11. Kommunan hevur selt burturav matr. 208c til Jógvan Elias og Edith á Løgmansbø eigarar av matr. nr. 208i at leggja afturat grundstykki teirra.

Í sambandi við marknaumskipanina var lyfti givið US at broyta økið, sum var lagt afturat grundstykkinum frá F-øki (alment frítíðarøki) til B-øki (sethúsaøki).

12. Ingi Joensen hevur í skrivi tann 22. september 2016 spurt, um kommunan kann vísa á eitt øki, har hann kann byggja neyst. Býráðið hevur samtykt á fundi tann 24. oktober 2016, at fyrispurningurin frá Inga um neystaøki verður tikin við, tá býarplanurin verður viðgjørdur.

13. Dánjal Thomsen býráðslimur mælir til, at ein gongugøta úr Sørpum til busskýlið við býráðsskrivstovuna verður løgd inn í býarplanin.

14. Hjalmar Reynstind hevur biðið um, at ein gongugøta verður gjørd frá Nýggjavegi oman gjøgnum geilina í Heiðaveg.

15. Byggiloyvi er givið til rossafjós á matr. nr. 277b í Miðvági, hóast stykkið liggur í H-øki (frílendi). Kristin Ellefsen viðmerkti í byggimálsviðgerðini, at byggisamtyktin átti at vera fylgd. Býráðslimir umrøddu tá, at rætt var at leggja økið, har fjósið stendur, sum landbúnaðarøki.

16. Eigarin av matr. nr. 11a í Sandavági hevur víst áhuga at keypa part av matr. nr. 347. Býráðið hevur áður vilja selt. Avbjóðingin er tann, at matr. nr. 347 liggur í H-øki (frílendi). Um økið skal seljast, má tað leggjast sum B-øki (sethúsaøki) í býarplaninum.

17. Hans Albert Vang metir, at ætlaði vegurin omanfyri sethús hansara á matr. nr. 344 í Miðvági kemur ov nær húsunum í vestara enda. Hann biður um, at vegaføringin verður broytt soleiðis, at vegurin fluktar við húsini.

18. Seinast býarplanurin fyri alla bygdina var endurskoðaður, heitti borgarstjórin á Jon S. Hansen um at skráseta øll krígsminni í kommununi. Ætlanin var at leggja skrásetingina inn í býarplanin, men stundir vóru ikki til tess.
Skrásetingin er nú gjørd, men ikki løgd inn í býarplanin.

19. Seinast býarplanurin fyri alla bygdina var endurskoðaður, hevði tásitandi borgarstjórin samband við Búnaðarstovuna. BST greiddi frá, at tey arbeiddu við at gera skrásetingar um landbúnaðarjørð í øllum landinum. Tey lovaðu tá, at Vága kommuna skuldi fáa eitt lag yvir landbúnaðarjørð at leggja í býarplanin. Hetta er ikki gjørt.

*Formansváttan:*____________

20. Notat liggur í málinum frá fyrrverandi tekniska leiðaranum, har verður mælt til, at orðið “fornminni” í byggisamtyktini átti at verið broytt til “varðveitingarvert” e.l.

21. Býarplanur fyri K1 og K2 – øki.

Fyri K2 innangarðs stendur, at bert er loyvt at byggja 40m$^2$.

Fyri k1 uttangarðs stendur, at loyvt er at byggja tað, sum er hóskiligt og neyðugt til at drifta økini – og at hetta skal fella væl í lendi.

40m$^2$ markið dekkar møgulig summarhús, sum kunnu stingast upp, men hetta er ikki nokk til f.eks. eitt trivaligt seyðahús innangarðs.

22. Uppskot frá Eigil Rasmussen um, at fjøran í Miðvági skal merkjast varveitingarverd.

23. Í byggisamtyktini er ásett, at loyvda byggifrástøða til bryggjutrom í havnarøki er 20m. Á havnalagnum í Miðvági er frástøðan fleiri staðni 13-14 m.

24. Býráðið hevur nakrar ferðir saknað heimild til at áseta treytir í sambandi við skráar móti grannaogn.

Í onkrum førum ríður tilfar inn á grannan frá brøttum skráa.

Í øðrum førum hevur granni grivið seg tætt inn undir grannaogn, har grannin er vorðin bangin fyri vandanum, at partur av ognini ríður niður.

Í serstøku byggisamtyktini fyri økið við Olivarsveg og Dagmarsgøtu stendur:
*“Um grivið verður nærri enn 5 m frá bakkanti á gongubreyt ella vegi, hevur eigarin av stykkinum, har grivið verður, ábyrgdina av at tryggja vegin og at tryggja, at veggurin á húsum niðan móti vegnum, klárar trýstið frá vegnum við ferðslu. Kommunan ber ongar útreiðslur av garði ella stuðlamúri, sum stendst av hesum.”*

Tekniski leiðarin mælir til, at omanfyri standandi áseting verður tikin við í byggisamtyktina eins og niðanfyri standandi brot:

*“Um grivið verður móti grannaogn, hevur eigarin av stykkinum, har grivið verður, ábyrgdina av at tryggja, at ikki ríður burtur av grannaognini. Hann hevur skyldu til, fyri egnan kostnað, at gera garð ella stuðlamúr móti grannaognini ella gera skráa, sum ikki er reystari enn 50 stig.*

*Tá planerað verður hægri enn grannaogn, gongubreyt ella vegur, hevur eigarin av stykkinum, har planerað verður, ábyrgdina av at tryggja, at ikki ríður burtur av ognini. Hann hevur skyldu til, fyri egnan kostnað, at gera garð ella stuðlamúr móti grannaognini, gongubreyt ella vegi, ella gera skráa, sum ikki er reystari enn 50 stig.“*

*Formansváttan:*____________

**Tekniska nevnd 07. februar 2020:**
**Avgerð:**

Mælt verður til:

1. At økið F og avlagda gøtan norðanfyri parkeringsøkið verður lagt í øki H ( Frílendi). Avlagda gøtan undir parkeringsøkinum verður løgd afturat parkeringsøkinum.
2. At gera avtalu við festaran um gøtuna.
3. Ikki at ganga kæruni á møti.
4. At ganga umbønini á møti.
5. At ganga umbønini á møti.
6. At ganga umbønini á møti.
7. At økið A miðstaðarendamál vestanfyri Torvgøtu verður broytt til øki B Sethúsaøki.
8. Ikki at ganga umbønini á møti.
9. At fara í samráðingar við eigararnar.
10. At leggja matriklarnar, sum liggja partvís í øki H í øki B.
11. At leggja allan matrikul 208i í øki B.
12. Onki at gera við málið.
13. At leggja gøtuna í byggisamtyktina.
14. At leggja gøtuna í byggisamtyktina.
15. Ikki at gera nakrar broytingar.
16. Ikki at gera nakrar broytingar.
17. At broyta vegaføringina.
18. At leggja krígsminnir í býarplanin.
19. Ongin avgerð.
20. Ikki at gera nakrar broytingar.
21. Ikki at gera nakrar broytingar.
22. Ikki at gera nakrar broytingar.
23. Ikki at gera nakrar broytingar.
24. At takað heimildina við í byggisamtyktina.

**Býráðið 24. februar 2020:**
**Avgerð:**

Samtykt at:

1. taka undir við teknisku nevnd,
2. taka undir við teknisku nevnd,
3. taka undir við teknisku nevnd,
4. taka undir við teknisku nevnd,
5. taka undir við teknisku nevnd,
6. taka undir við teknisku nevnd,
7. taka undir við teknisku nevnd,
8. taka undir við teknisku nevnd,

*Formansváttan:*____________

9. taka undir við teknisku nevnd,
10. taka undir við teknisku nevnd,
11. taka undir við teknisku nevnd,
12. taka undir við teknisku nevnd, (Jóhannis Joensen fór av fundi meðan punktið varð viðgjørt),
13. taka undir við teknisku nevnd,
14. taka undir við teknisku nevnd,
15. taka undir við teknisku nevnd,
16. taka undir við teknisku nevnd,
17. taka undir við teknisku nevnd,
18. taka undir við teknisku nevnd,
19. borgarstjórin arbeiðir víðari við málinum,
20. taka undir við teknisku nevnd,
21. taka undir við teknisku nevnd,
22. taka undir við teknisku nevnd,
23. taka undir við teknisku nevnd,
24. taka undir við teknisku nevnd.

*Formansváttan:*____________

## 9/20 Støðutakan til uppskot frá Lydiu Laksáfoss um, hvat skal gerast við Kálvalíð-savnið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 05.02.2020 | 3/20 |
| 2 Býráðið | 24.02.2020 | 9/20 |

**Málslýsing:**

Lydia Laksáfoss sendi 21.02.2020 Vága kommunu uppskot um, hvat skal gerast við Kálvalíð-savnið. Borgarstjórin hevur avgjørt, at býráðið skal taka støðu til uppskotið.

Hugsanin aftanfyri uppskotið er *'at Kálvalíð eigur at síggja út eins og tá Beinta búði í húsunum, tí hon er tann mest kenda, sum hevur búð har'*.

Ein kostnaðarmeting er í uppskotinum, sum samanlagt ljóðar á millum kr. 75.400 og kr. 106.000.

Í uppskotinum verður eisini víst á, at tørvur er á wc-fasilitetum í nánd av húsunum, sum vitjandi kunnu brúka. Kostnaður fyri hetta er ikki íroknaður kostnaðarmetingini í uppskotinum.

**Viðmerkingar frá umsitingini:**

Í fíggjarætlanini fyri 2020 eru, á konto 5.24.32 Søvn og mentanararvur, avsettar 70 tkr. til keyp av vørum og tænastum. Mælt verður til, at um býráðið samtykkir at fremja ætlanina ella partar av ætlanini í uppskotinum, at fígging so verður fingin til vega við eykaætlan.

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 05. februar 2020:**
**Avgerð:**

Mælt verður til, at arbeiða víðari við málinum.

**Býráðið 24. februar 2020:**
**Avgerð:**

Samtykt at fara undir at fremja ætlanina, við tí fyrivarni, at alt arbeiði verður gjørt í samráð við og við góðkenning frá Tjóðsavninum.

*Formansváttan:____________*

VÁGA KOMMUNA

# 10/20 Umsókn um byggiloyvi til umbygging v. m á matr. nr. 49 í Sandavági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.02.2020 | 14/20 |
| 2 Býráðið | 24.02.2020 | 10/20 |

**Málslýsing:**

Karl Martin Niclasen og Beinta Lisberg søkja vegna Piu og Per Svanborg um byggiloyvi til umbygging v.m. á matr. nr. 49 ´´i Sandavági.

Matrikulin liggur á Skræddaragøtu 10.

Søkt verður um loyvi at takað verandi yvirtrom oman av húsunum, og gera nýggja yvirtrom við einvegis hallið. Hægsta punkt á húsunum eftir umbygging verður umleið 800 mm lægrið enn verandi hús.

HMP hevur byggimálsviðgjørt umsóknina og einasta viðmerking teirra er, at bjargingarop skulu verða eftir krøvunum í BK 17.
Um byggiloyvi verður givið má hetta viðmerkjast í loyvinum.

**Viðmerkingar frá umsitingini:**

Av tí at verandi hús standa í mark móti Skræddaragøtu, kemur bjálving og klæðing av útveggi eini 160 mm longur út á vegin, enn núverandi útveggur. Her má byggivaldið geva frávik.

**Tekniska nevnd 07. februar 2020:**
**Avgerð:**

Mælt verður til at geva byggiloyvi við fráviki.

**Býráðið 24. februar 2020:**
**Avgerð:**

Samtykt at taka undir teknisku nevnd við teirri treyt, at allar ásetingar í BK17 verða fylgdar.

*Formansváttan:____________*

## 11/20 Støðutakan til tilboð frá Gilla Hansen um at keypa matr. nr. 133k í Sandavági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 13.02.2020 | 10/20 |
| 2 Býráðið | 24.02.2020 | 11/20 |

**Málslýsing:**

Gilli Hansen boðar frá, at hann hugsar um at selja matr. 133k norðuri í Sørpun í Sandavági.

Stykkið er 15.600 $m_2$ og liggur í B-øki (sethús). Á stykkinum standa tveir bygningar, sum eru umvældir síðan 2012.

Gilli spyr, um kommunan er áhuga í at
keypa, áðrenn ognin fer út til eina møguliga almennu sølu.

**Tekniska nevnd 18. november 2019:**
**Avgerð:**

Viðmælt at fara í samráðingar um møguligt keyp av lendinum.

**Fíggjarnevndin 21. november 2019:**
**Avgerð:**

Samtykt at kanna hvat lendið kann keypast fyri.

**Nýggir upplýsingar í málinum:**

Í telduposti 30. januar kemur eigarin við fleiri uppskotum um prís, tey eru sett upp niðanfyri, seljari er eisini áhugaður í aðrari loysn um Vága kommuna heur uppskot um tað.

Uppskot til prísir:

1. 3 mió
2. 2,85 mió, Grundstykki matr. 4u

Viðmerkingar frá umsitingini:

Samlaður kostnaður av matr. Nr. 133k hevði verði Kr. 2.992.200,-

*Formansváttan:*____________

3. 2,8 mió, Flag til ca. 180m2 tak, Grundstykki matr. 4u,

Viðmerkingar frá umsitingini:

Samlaður kostnaður av matr. Nr. 133k hevði verði Kr. 2.952.200,-

4. 2,7 mió, Flag til ca. 180m2 tak, Grundstykkir matr. 4u og 4t

Viðmerkingar frá umsitingini:

Hendan loysn er ikki ein møguleiki av tí at matr. Nr. 4t er ikki til sølu.

5. 2,7 mió, Flag til ca. 180m2 tak, Grundstykki matr. 4u, og Asfalt á bilastøðlar á matr. 4u (samstundis sum vegur ella gonguteigur verða asfalterað)

Viðmerkingar frá umsitingini:

Samlaður kostnaður av matr. Nr. 133k hevði verði umleið Kr. 3.000.000,- ( Tað er ógjørligt at roknað út av tí at $m^2$ talið av asfalt ikki er upplýst.

6. 2.6 mió, Flag til ca. 180m2 tak, Grundstykkir matr. 4u og 4t, og Asfalt á bilastøðlar á matr. 4u (samstundis sum vegur ella gonguteigur verða asfalterað)

Viðmerkingar frá umsitingini:

Hendan loysn er ikki ein møguleiki av tí at matr. Nr. 4t er ikki til sølu.

7. 2.5 mió, Flag til ca. 180m2 tak, Grundstykkir matr. 4u og 4t, og Asfalt á bilastøðlar á matr. 4u ca. (samstundis sum vegur ella gonguteigur verða asfalterað), Stoypa stuðlamúr ímóti matr. 4y og bilastøðlum.

Viðmerkingar frá umsitingini:

Hendan loysn er ikki ein møguleiki av tí at matr. Nr. 4t er ikki til sølu.

8. 2.3 mió, Flag til ca. 180m2 tak, Grundstykki matr. 4u, Asfalt á bilastøðlar á matr. 4u ca. (samstundis sum vegur ella gonguteigur verða asfalterað), Grava út og planera matr. 4u, Stoypa stuðlamúr ímóti matr. 4y og bilastøðlum.

Viðmerkingar frá umsitingini:

Hendan loysn er ikki gjørlig at prísseta av tí at ongar mongdir eru upplýstar.

*Formansváttan:*____________

9. 2,2 mió, Flag til ca. 180m2 tak, Grundstykkir matr. 4u og 4t, Asfalt á bilastøðlar á matr. 4u ca. (samstundis sum vegur ella gonguteigur verða asfalterað), Grava út og planera matr. 4u, Stoypa stuðlamúr ímóti matr. 4y og bilastøðlum.

Viðmerkingar frá umsitingini:

Hendan loysn er ikki ein møguleiki av tí at matr. Nr. 4t er ikki til sølu.

Ætlað bygging á matr. Nr. 4u

**Fíggjarnevndin 13. februar 2020:**
**Avgerð:**

Mælt verður frá at keypa, so leingi sum ongin ætlan er gjørd fyri økið.

**Býráðið 24. februar 2020:**
**Avgerð:**

Samtykt at taka undir við fíggjarnevndini.

*Formansváttan:____________*

## 12/20 Støðutakan til fyrispurning frá Petur Elias Petersen um at gera makaskifti millum matr. nr. 237c og 236b í Sandavági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 10.01.2020 | 3/20 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.01.2020 | 4/20 |
| 3 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 05.02.2020 | 5/20 |
| 4 Býráðið | 24.02.2020 | 12/20 |

**Málslýsing:**

Kommunan hevur heitt á Petur Elias Petersen um at selja kommununi partin av matr. nr. 237c í Sandavági, har kommunan hevur latið gjørt gøtu og oman til Stórá. Talan er um umleið 72 fermetrar.



Lendið, kommunan hevur heitt á Petur Elias um at selja

Petur Elias hevur vent aftur við fyrispurningi, um kommunan vil gera gerðabýti soleiðis, at hann fær tann lutin frá kommununi, sum er norðanfyri garðin (Løgmannsgarðin) á matr. nr. 236b frá gøtuni og niðan ímóti vegnum á Steigartúni. Um tann ognin er størri, er hann sinnaður at rindað gjald fyri munin.

*Formansváttan:____________*



Lendið, Petur Elias ynskir at ogna sær

Sambært uppmáting á Kortal.fo er lendið, Petur Elias ynskir at ogna sær frá kommununi, umleið 112 fermetrar.

Í býarplaninum liggur matr. nr. 237c í B-øki (sethús) og H-øki (frílendi).
Matr. nr. 236b liggur í M-øki (fornminni).
Umhvørvisstovan krevur vanliga, at øki er avlagt til sama endamál, um marknaumskipan skal fremjast. Er talan um smáar broytingar, hava tey onkuntíð gingið við til, at býarplanurin er tillagaður aftaná broyting.




Formansváttan:____________

Viðmerkingar frá umsitingini: Talan er um øki við Løgmansgarðin. Um býráðið ynskir at lata lendið, metir umsitingin tað vera rætt, fyrst at hoyra Tjóðsavnið.

**Tekniska nevnd 10. januar 2020:**
**Avgerð:**

Viðmælt.

**Fíggjarnevndin 16. januar 2020:**
**Avgerð:**

Avgjørt at beina málið í mentanar- og trivnaðarnevndina.

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 05. februar 2020:**
**Avgerð:**

Mælt til at viðmæla makaskifti, treytað av góðkenning frá Tjóðsavninum og øðrum viðkomandi myndugleikum.

**Býráðið 24. februar 2020:**
**Avgerð:**

Samtykt at taka undir við mentunar- og trivnaðarnevndini.

# 13/20 Støðutakan til ynski hjá Hans Paula Johannesen um at geva neyst á matr. nr. 173b í Miðvági og bát til Miðvágs Bygdasavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 05.02.2020 | 6/20 |
| 2 Fíggjarnevndin | 13.02.2020 | 13/20 |
| 3 Býráðið | 24.02.2020 | 13/20 |

**Málslýsing:**

Hans Pauli Johannesen í Miðvági hevur sent kommununi skriv um, at hann ynskir at geva neystið á matr. nr. 173b í Miðvági til Miðvágs Bygdasavn, eins og bátin, sum stendur í neystinum.

Neystið er partur av matr. nr. 173b í Miðvági. Um býráðið tekur ímóti gávuni er neyðugt, at neystagrundin verður frámatrikulera matr. nr. 173b.

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 05. februar 2020:**
**Avgerð:**

Mælt verður til at kommunan tekur ímóti gávuni.

**Fíggjarnevndin 13. februar 2020:**
**Avgerð:**

Taka undir við tilmælinum hjá Mentunar- og trivnaðarnevndini

**Býráðið 24. februar 2020:**
**Avgerð:**

Samtykt at taka ímóti gávuni.

*Formansváttan:*____________

VÁGA KOMMUNA

## 14/20 Net søkir um at fáa økið á Matr. nr. 12c til at seta tøknihús og mastur á.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.02.2020 | 15/20 |
| 2 Býráðið | 24.02.2020 | 14/20 |

**Málslýsing:**

Net søkir um at fáa økið á matr. nr. 12c í Miðvági til at seta tøknihús og mastur á.

Teir eru undir tíðartrýsti, tí teir skulu út úr bygninginum har teir eru nú.

Tað hevur eisini stóran týdning fyri teir, at teir vita hvar teir kunnu fáa loyvi at verða í framtíðini, tí teir fáa ikki lagt til rættis tær útbyggingar av netinum, sum eru átroðkandi at fáa gjørdar.

Tekniski leiðarin hevur samskift við Net um málið, og siga teir at tað ikki er so átroðkandi, at tøknihúsið verður staðsett júst har teir vísa á tekningini. Tað kann eisini standa á øðrum stað í sama umráði.

**Tekniska nevnd 07. februar 2020:**
**Avgerð:**

Nevndin mælir til at staðseta hús og mastur vestanfyri norðara horn á gamla telefonhúsinum. Sí tekning.

**Býráðið 24. februar 2020:**
**Avgerð:**

Samtykt at geva loyvi við teirri staðseting, sum tekniska nevnd mælir til.

*Formansváttan:*____________

## 15/20 Ummæli av umsókn um sundurbýti av matr. nr. 97a í Sandavági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.02.2020 | 16/20 |
| 2 Býráðið | 24.02.2020 | 15/20 |

**Málslýsing:**

Umhvørvisstovan hevur sent kommununi umsókn frá Kristionnu Haraldsen um sundurbýti av matr. nr. 97a í Sandavági til ummælis.
Ætlanin er at býta grundstykki, sum er 418 fermetrar frá restini av ognini.
Grundstykkið liggur í øki B: Sethúsaøki.

**Tekniska nevnd 07. februar 2020:**
**Avgerð:**

Viðmælt.

**Býráðið 24. februar 2020:**
**Avgerð:**

Viðmælt.

VÁGA KOMMUNA

# 16/20 Støðutakan til umsókn frá Miðvágs Róðrarfelag um fíggjarligan stuðul til at gera bátabrúgv

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 05.02.2020 | 11/20 |
| 2 Fíggjarnevndin | 13.02.2020 | 11/20 |
| 3 Býráðið | 24.02.2020 | 16/20 |

**Málslýsing:**

Miðvágs Róðrarfelag hevur í skrivi dagfest 02.02.2020 søkt Vága kommunu um fíggjarligan stuðul til at gera nýggja bátabrúgv fyri.

Arbeiðið verður tilsamans mett at kosta umleið kr. 100.000.

**Viðmerkingar frá umsitingini**

Á konto 5.24.14 Stuðul til ítróttar- og mentanarmál, undirkonto 10 Stuðul til ítrótt í fíggjarætlanini fyri 2020 eru avsettar kr. 920.000. Av hesum eru kr. 815.000 játtaðar til ymisk endamál. Tøk játtan á kontuni Stuðul til ítrótt er sostatt kr. 105.000 fyri restina av fíggjarárinum 2020.

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 05. februar 2020:**
**Avgerð:**

Mælt verður til at játtað stuðul.

**Fíggjarnevndin 13. februar 2020:**
**Avgerð:**
Mælt verður til at játta kr. 100.000,- til bátabrúgv.

**Býráðið 24. februar 2020:**
**Avgerð:**

Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

*Formansváttan:*____________

## 17/20 Støðutakan til uppskot frá borgarstjóranum um at lata Sandavágs Ítróttarfelag (SÍF) Loftagrund (matr. nr. 150d í Sandavági) til ognar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 05.02.2020 | 12/20 |
| 2 Fíggjarnevndin | 13.02.2020 | 12/20 |
| 3 Býráðið | 24.02.2020 | 17/20 |

**Málslýsing:**

Borgarstjórin hevur í skrivi dagfest 03.02.2020 vegna Vága kommunu bjóða Sandavágs Ítróttarfelag 1.200.000 kr fyri SÍF-húsið.

Sum part av handlinum, skjýtur borgarstjórin upp, at kommunan skeytar Loftagrund (matr. nr. 150d í Sandavági), sum kommunan eigur, til Sandavágs Ítróttarfelag við klasuli um, at SÍF ikki kann selja ognina, men bert kann avhenda hana aftur til Vága kommunu.

Skyn metti í januar 2018 virði á ognini til millum 300.000 og 350.000 kr.

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 05. februar 2020:**
**Avgerð:**

Viðmælt.

**Fíggjarnevndin 13. februar 2020:**
**Avgerð:**
Mælt verður til at taka undir við Mentunar- og trivnaðarnevndini við hesi broyting.
At kommunan fær forkeypsrætt at keypa Loftagrund (matr.nr. 150d) aftur um tað skal seljast.

**Býráðið 24. februar 2020:**
**Avgerð:**

Samtykt at taka undir við fíggjarnevndini.

*Formansváttan:____________*

VÁGA KOMMUNA

# 18/20 Støðutakan til, um arbeiði at gera útstykking eystanfyri Skaldaveg skal bjóðast út

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.02.2020 | 13/20 |
| 2 Býráðið | 24.02.2020 | 18/20 |

**Málslýsing:**

Býráðið samtykti tann 20. november 2017 at gera eina útstykking eystanfyri Skaldaveg.

HMP hevur gjørt uppskot til, hvussu útstykkingin skal síggja út í samráð við teknisku deild.

HMP hava gjørt útbjóðingartilfar og kostnaðarmeting.

**Tekniska nevnd 07. februar 2020:**
**Avgerð:**

Nevndin vil hava fleiri upplýsingar í málinum.

**Býráðið 24. februar 2020:**
**Avgerð:**

Samtykt at bjóða arbeiðið út.

*Formansváttan:*____________

Fundurin lokin kl. 20:05

Eyðdis Hartmann Niclasen

Rósa Samuelsen

Dagbjørn Hansen

Albert Ellefsen

Jens Gaardlykke

Heðin Poulsen

Dánjal Thomsen

Jonhard Joensen

Jórun S. Haraldsen

Dánial Johansen

Jóhannis Joensen

*Formansváttan:*_____________